# Vandamiklir barnavognar

**Fyrst í hesum mánaðinum kom Danmarks Radio við einari søgu um royndir av barnavognum í Danmark. 12 vognar vóru kannaðir, og sjey av teimum skulu, sambært Trygdarstýrinum hjá danska vinnumálaráðnum, takast av marknaðinum, tí teir eru vandamiklir**

BARNAVOGNAR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sjey út av 12 barnavognum hava dumpað eina trygdarroynd hjá trygdarstýrinum í danska vinnumálaráðnum. Vognarnir verða skýrdir at vera lívshættisligir fyri børn.

Ein av teimum sjey vognunum, sum er dumpaður, er ein vognur, sum er nógv at síggja í gøtunum í Føroyum. Talan er um tann vælumtókta Simo kombivognin.

Í grundgevingunum frá trygdarstýrinum verður millum annað sagt, at vandi er fyri, at eitt barn kann koma í klemmu millum lift og handtak á Simo kombivogninum.

## Góðtaka ikki roynd

Sosialurin hevur tosað við Mariann Fuglø, sum eigur barnaútgerðhandilin Ciconia í Klaksvík. Hon sigur, at tey hava fingið bræv frá teimum, sum tey keypa frá, har boð eru um, at nakrir ávísir vognar skulu sendast aftur til Danmarkar, tí teir ikki longur skulu seljast. Men hetta er ikki aktuelt í Føroyum, tí hesir vognar verða ikki seldir her.

Men tá tað kemur til Simo kombivognin fingu tey boð um ikki at taka vognin úr handlinum, men bert at bíða eftir nærri boðum niðrifrá. Tí ENG Denmark A/S sigur seg ikki kunna góðtaka royndina, sum Simo kombi vognurin var til.

Í einum brævi, sum Ciconia hevur fingið niðrifrá, stendur, at sambært Trygdarstýrinum, so er vognurin lívshættisligur, tí at eitt barn kann blíva fast millum liftina og handtakið. Men verður sagt frá ENG, at fyri at hetta skal verða ein veruligur vandi, so skal talan vera um eitt barn, sum er millum 2 og 3 ára aldur, sum liggur í liftini, barnið má liggja uttan selar í vogninum, so at tað av sær sjálvum kann grulva úr liftini og handtakið skal verða í niðastu positión. Hetta er ikki ein positión, sum tað verður trillað í. Hon verður bert nýtt, um vognurin skal leggjast saman og taka so lítið pláss sum tilber. Og í síðsta førinum má barnið detta út við beinunum fremst, um vandin við at vera fast millum handtak og lift, skal vera veruligur. Og tað er hetta, sum ENG Denmark A/S ikki kann góðtaka.

## Vognurin ikki vandamikil

Mariann Fuglø sigur, at fleiri fólk hava vent sær til handilin fyri at fregnast. Summi hava spurt, hvat trupulleikin er og onnur hava skemtað við tí, tí tey meta ikki, at tað kann passa.

– Øll, sum eg havi tosað við, eru glað fyri vognin, og tí skilji eg ikki, at ein tílík roynd verður gjørd eftir treytum, sum vognurin als ikki er gjørdur til, sigur Mariann.



*Ein av teimum sjey vognunum, sum dumpaði trygdarroyndina, er tann vælumtókti Simo kombi vognurin, sum er nógv seldur í Føroyum*

Hon vísir á, at eitt tvey til trý ára gamalt barn ikki passar í liftina, sum vanliga verður nýtt í mesta lagið eitt ár. Hartil munnu tey foreldur, ið lata síni børn sita óbundin í vognunum, verða sera fá í tali, heldur Mariann, sum eisini leggur afturat, at um fólk ikki eru trygg við liftina, sum kemur við keypinum av einum Simo kombivogni, so er onki til hindurs fyri, at tey kunnu fáa eina vanliga lift.

– Og so hatta við handtakinum. Handan positiónin verður bara nýtt, tá vognurin til dømis skal leggjast í ein bil, so tað er ikki eftirfarandi, sigur Mariann, sum eisini setur spurnartekin við, hvussu eitt barn kann detta við beinunum fyrst úr eini lift.

Kombivognurin er ein vognur,sum verður nýttur í fleiri ár, tí hann kann gerast til ein koyristól seinni, og tað er allarhelst ein av orsøkunum til, at hann er so vælumtóktur.

Fólk, sum Sosialurin hevur tosað við, sum eiga slíkar vognar, siga seg als ikki skilja, at hann skal vera so vandamikil. Tey hava bara alt gott at bera vogninum.

Tað er ikki endaliga avgjørt enn kortini, um vognarnir verða tiknir av marknaðinum, tí ENG hevur sum sagt kært hetta málið.

– Hetta gevur Simo eitt stórt sár, siga tey í Danmark, sigur Mariann, sum tá Sosialurin tosaði við hana, bíðaði eftir endaligum boðum um, hvat skal henda við vognunum.

# Fjølmiðlafakfestivalur

**Fakfestivalur 2004 fyri fjølmiðlaheimin verður 28. februar. Tað er felagið Synergi, sum skipar fyri honum**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fakfestivalur 2004 fyri føroyska fjølmiðlaheimin verður í nútímans hølunum hjá Føroya Sjómansskúla 28. februar.

Hetta er fyrsti fakfestivalur, ið verður hildin fyri føroyska fjølmiðlaheiminum, og nógv spennandi evni og fyrilestrahaldarar eru á skránni.

Arbeiðir tú í fjølmiðlaheiminum, on ella back stage, innan formidling, t.d. politikari, á lýsingarstovu ella á annan hátt hevur áhuga í evnunum/fyrilestrahaldarunum, so er 28. februar dagurin, har tú hittir onnur við somu fakligu áhugamálum.Tað er her tú fært motiviatión, meirvitan og skapar netverk !

Bjørt Samuelsen, journalistur, kemur at stýra degnum. Evsta mark fyri tilmelding er fríggjadagin 13. februar.



*Millum fyrilestrarhaldararnar til fyrsta fjølmiðlafakfestivalin av sínum slag í Føroyum, verður Hans Engell, blaðstjóri á Ekstra Blaðnum*

*Savnsmynd*

**6 blokkar:**

Blokkur 1 er 4 statsmaktin - Ógegni - Alment innlit

Hans Engell, blaðstjóri á Ekstra Blaðnum fer millum annað at tosa um uppgávuna hjá miðlunum og uppgávuna hjá tí almenna í mun til miðlarnar.

Kurt Strand frá DR-Dokumentar, Profilen fer at tosa um 4'statsmaktina, fjølmiðlar og politikk - hvør stýrir hvørjum.

Øssur Winthereig, journalistur og ein av rithøvundunum til bókina "Skjót journalistin" fer at tosa um ógegni, millum annað hvussu handfara vit ógegni í sambandi við borandi journalistik í Føroyum. Hvussu halda vit arbeiðið og privatlívið sundurskilt. Eisini fer hann at tosa um journalistar í politikki.

Johnhard Klettheyggj, løgfrøðingur hjá Løgtingsins Umboðsmanni fer at tosa um lógina um alment innlit.

Blokkur 2 er um Gallup Føroyar - Samskiftismenning

Ellindur Egilstrøð, stjóri Gallup Føroyar fer at hava framløgu við feskum tølum um fjølmiðlaheimin.

Tróndur Djurhuus, menningarstjóri í Føroya Tele og nevndarformaður í Bitland Enterprise fer at tosa um samskiftismenning, møguleikar og avbjóðingar fyri føroysku fjølmiðlarnar. T.d. Breiðband Føroyar, SMS, MMS, avbjóðingarnar frá digitalu sjónvarpsnetunum. Harumframt fer hann at tosa um blaðhús ella fleirmiðlahús - kravið um og møguleikarnar fyri optimering.

Blokkur 3 er um spyrjiteknikk

Hetta verður ein 2 tíma long sessión við Kurt Strand, um spyrjuteknik, djúpdarboring og stýring av eini samrøðu. Kurt Strand hevur skrivað ein bók um júst hetta evni.

Blokkur 4 snýr seg Samstarv - Útbúgving - Trivnaður

Kári Durhuus, frá Fjølmiðlaráðgevingini fer at hugleiga um føroyskir fjølmiðlar á einum vegamóti. Ein lýsing av føroyska fjølmiðlaheiminum anno 2004.

Edvard Joensen, formaður í Blaðmannafelagnum fer at tosa um framtíðarútlitini hjá Blaðmannafelagnum.

Birgir Kruse, rektari á Nordisk Journalistcenter fer at tosa um týdningin av at útbúgva og víðariútbúgva seg sum journalistur.

Blokkur 5: Speakers Corner

Hevur tú okkurt uppá hjarta, hevur tú høvi at bera tað fram her. 40 minuttir eru settar av til Speakers Corner.

Blokkur 6: Framtíðarscenarie

Hans Engell fer at hugleiða um framtíðarscenarie innan fjølmiðlaheimin, internet kontra annan tíðindaflutning - mediakonvergens.

Fakfestival døgurði v/Sámali Ravnsfjall og Ronnie Nielsen verður um kvøldið.

Tilmelding hjá Synergi, t e l d u p o s t u r synergi@synergi.fo. Meiri fæst at vita á heimasíðuni www.synergi.fo.



# Meira tilvild enn siðvenja

**Ongar ætlanir eru um at lata andstøðuni annað um boðið í Norðurlandaráðnum. Talan er ikki um eina siðvenju – men um reina tilvild, tí samgongurnar altíð hava verið so smalar, sigur Kristian Magnussen, formaður Javnaðarfloksins á tingi**

LØGTIGNIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Samgongan fer uttan iva at gera so, sum avtalað er millum samgonguna og Sjálvstýrisflokkin, og velja Kára P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum og Óla Breckmann úr Fólkaflokkinum í Norðurlandaráðið.

– Kári P. Højgaard hevur sjálvandi ta einføldu uppgávu at tryggja sær og Sjálvsýrisflokkinum so stóra ávirkan sum gjørligt. Og tað er uttan iva orsøkin til, at samgongan og Sjálvstýrisflokkurin hava gjørt avtalu um valbólk, sigur Kristian Magnussen, sum er formaður Javnaðarfloksins á tingi.

Hann heldur als einki løgið vera í, at samgongan velur bæði umboðini í Norðurlandaráðið.



*– Eg dugi ikki at síggja, at talan er um eina siðvenju. Tað er meira tilvildin, sum hevur gjørt, at andstøðan hevur átt annan limin í Norðurlandaráðnum, tí samgongurnar hava havt so smalt parlamentariskt grundarlag, sigur Kristian Magnussen, formaður Javnaðarfloksins á tingi*

– Hasum síggi eg einki løgið í, og eg dugi illa at síggja, at talan er um eina siðvenju. Tað er nógv meira tilvildin, sum hevur gjørt, at andstøðan so ofta hevur havt annað umboðið, tí samgongurnar hava verið so smalar, sigur Kristian Magnussen.

Hann ivast eisini í, hvussu stóran politiskan týdning ein sessur í Norðurlandaráðnum.

– Norðurlandaráðið er meira eitt forum, har fólk koma saman. Sjálvandi kann tað vera eitt endamál í sær sjálvum, men tey ítøkjuligu úrslitini dugi eg illa at síggja, sigur hann.

Kristian Magnussen veit einki um, at avgerðin um valið til Norðurlandaráðið verður broytt, hóast málið bleiv útsett á tingfundinum hósdagin í síðstu viku. Valið stendur á skránni á tingfundinum í dag, og tá verða uttan iva Kári P. Højgaard og Óli Breckmann valdir limir í Norðurlandaráðið.

# Andstøðan vil hava Norðurlandaráðið

**Seinastu 25 árini hevur verið siðvenja, at andstøðan eigur annan sessin í Norðurlandaráðnum, sigur Tjóðveldisflokkurin**

*Breiða samgonan saman við andstøðuna fær báðar limirnar í Norðurlandaráðið. Hetta heldur Tjóðveldisflokkurin ikki vera rætt, hann heldur, at siðvenjan um, at andstøðan fær annað umboðið eigur at verða vird*

LØGTIGNIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í dag skal løgtignið velja tvey umboð í Norðurlandaráðið. Tjóðveldisflokkurin vil hava, at annað av teimum báðum umboðunum, sum løgtingið velur í Norðurlandaráðið, skal falla til andstøðuna. Flokkurin sigur, at siðvenja er, at samgonga og andstøða eiga hvør sítt umboð í Norðurlandaráðnum.

Men av tí at samgongan, sum telur 21 løgtingsfólk hevur gjørt valbólk saman við Sjálvstýrisflokkinum – og havið hevur 22 tingfólk aftan fyri seg, fær hon báðar sessirnar í Nor-ðurlandaráðnum. Hetta er tí, at 22 tingsessir av 32 er meira ein ein triðingur, og harvið fellur valið soleiðis út, at stóri valbólkurin fær báðar sessirnar í Norðurlandaráðnum. Um so var, at Føroyar høvdu tríggjar sessir, so hevði andstøðan fingið ein teirra.

Men tað sum Tjóðveldisflokkurin vísir á er, at tað er vorðið siðvenja, at samgonga og andstøða hava hava hvør sítt umboð.

– Hetta er ikki siðvenja í tinginum. Seinastu knøppu 25 árini hevur siðvenja verið, at samgonga og andstøða eiga hvør sítt umboð í Norðurlandaráðnum, og at andstøðan sjálv ger av, hvør røkir annan sessin í Norðurlandaráðnum, sigur Tjóðveldisflokkurin á tingi í brævi til løgtingsformannin og til løgmann.

Flokkurin sigur víðari, at tað er ein týdningarmikil siðvenja, tí umboðan Løgtingsins í Norðurlandaráðnum hevur ongantíð verið partur av samgongu og andstøðupolitikki.

– Hinvegin hevur umboðanin í Norðurlandaráðnum verið eitt fyrimyndarligt dømi um, at Løgtingið hevur verið breitt umboðað, og at semja er millum andstøðu og samgongu um at virka fyri føroyskum áhugamálum í Norðurlandaráðnum.



Tjóðveldisflokkurin vísir á, at tað seinastu seks árini hevur millum annað eydnast í góðum samstarvi millum landsstýrismannin í Norðurlandamálum og norðurlandaráðslimirnar hjá samgongu og andstøðu at fremja týdningarmikil mál fyri Føroyar í Norðurlandaráðnum:

– Føroyar hava fingið sjálvstøðuga umboðan í nevndini fyri Norðurlendska Mentanargrunnin.

– Norðurlandaráðið hevur eftir føroyskum uppskoti samtykt, at samstarvið við grannarnar í Útnorði verður styrkt (Skotland, Hetland, Orkneyoggjar, Hebridurnar, Írland, Ný Foundland o.o.)

– Umsókn er send um sjálvstøðugan limaskap í Norðurlandaráðnum og í Ráðharraráðnum eftir einmælda samtykt á tingi. Umsóknin er til viðgerðar í Norðurlandaráðnum í løtuni.

– Eftir uppskoti úr Føroyum er ein afturvendandi ráðstevna um havumhørvi og burðardygga nýtslu av tilfeinginum í Norðuratlantshavi skipað.

Landsstýrismaður í Norðurlandamálum seinastu seks árini hevur verið Høgni Hoydal.

– Tí fara vit at heita á Løgtingsformannin og Løgmann um at tryggja, at siðvenjan verður hildin, og at andstøðan kann velja annað umboðið í Norðurlandráðnum.

– Hetta hevði verið týðiligt tekin um, at eitt samt Løgting stendur aftan fyri formansskapin á Løgtingi, og at umboðan Løgtingsins í tí týdningarmikla norðurlendska samstarvinum røkkur út um føroyskan innanríkispolitikk og eisini hevur eitt samt løgting aftanfyri seg, sigur Tingbólkurin hjá Tjóðveldisflokkinum í brævinum til løgmann og løgtingsformannin.

## Fyrsti vanligi tingfundurin

LØGTIGNIÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í dag kl 13:30 verður tingfundur – og verður hetta fyrsti vanligi tingfundurin hjá nýggja løgtinginu, um vit so kunnu siga.

Á skránni er fyrst munnligir fyrispurningar, og teir skulu verða løgtingsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi kl 12 dagin fyri tingfundin. Ófráboðaðir fyrispurningar vara í mesta lagi í ein hálva tíma tilsamans.

Næsta punktið á skránni er atkvøðugreiðsla um fyrispurningin frá Annitu á Fríðriksmørk og Heidi Petersen sum er umrøddur her á síðuni.

Síðsta punktið á skránni verður val av tveimum umboðum í Norðurlandaráðið – og teir verða helst Óli Breckmann úr Fólkaflokkinum og Kári P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum.

Ófráboðaðir fyrispurningar vara í mesta lagi í ein hálvan tíma tilsamans.

Síðst á skránni er sum altíð framløga.